Kunngerð
Máls. nr. 23/00493

klaksvíkar kommuna

Endurskoðan av almennu byggisamtyktini fyri Klaksvíkar kommunu

Kærufreist 22. juli 2025

klaksvíkar kommuna

Kunngerð

Málsnr. 23/00493

Endurskoðan av almennu byggisamtyktini fyri Klaksvíkar kommunu

Við heimild í Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 2. mai 2025 verður við hesum boðað frá, at Klaksvíkar býráð samtykti á fundi 28. apríl 2025 uppskot um at endurskoða almennu byggisamtyktini fyri Klaksvíkar kommunu.

Eitt av høvuðsendamálinum við endurskoðanini er at dagføra almenna ásetingartekstin sambært Føroysku Bygningskunngerðini 2017 (BK17). Ávísingar og loysnir í BK17 eru meira viðkomandi og tíðarhóskandi í mun til bygging og nýtslu í dag.

Somuleiðis eru nýggjar ásetingar lagdar aftrat almenna ásetignartekstinum t.d. girðing, lýsing av vegaøki, heimildir viðvíkjandi nýtslu av fríøkjum og grundøkjavídd í samband við útstykkingar og annað.

Megin parturin av økisásetingunum í kommununi eru endurskoðaðir, har reguleringar eru gjørdar í einum størri hopi, t.d. dagføring í mun til BK17, tilvísingar og kort, fjølbroyttum bústaðarloysnum, smærri búeindum og greiðari nýtslulýsing. Nøkur økismørk eru eisini reguleraði í mun til verandi nýtslu.

Broytingar eru litaðar við reyðum, nýggjar orðingar eru litaðar við grønum, viðmerkingar og reguleringar í økismørkum eru litaðar við gulum og bláum.

Broytingin umfatar alla kommununa
GG: Onkrir økisásetignar eru ikki lýsir í hesi hoyring m.a. tí onnur viðgerð er í gongd.

Tilfar, sum lýsir uppskotið um at broyta almennu byggisamtyktina fyri Klaksvíkar kommunu, liggur frammi til alment eftirlit í Miðlan í Klaksvík frá 10. juni – 1. juli. 2025 og er somuleiðis at síggja á heimasíðu kommununnar: www.klaksvik.fo.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu vera Klaksvíkar kommunu í hendi í seinasta lagi 22. juli 2025. Tá ið mótmæli ella broytingaruppskot verða latin, viðmerkið málsnr. **23/00493.**

Kæruvegleiðing:
Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum og vísandi til almennu lýsingina, dagf. 10. juni 2025, um broyting í almenna ásetingartekstinum fyri Klaksvíkar kommunu, skulu møgulig mótmæli ella broytingaruppskot vera kommununi í hendi í seinasta lagi 22. juli 2025. Vísandi til § 6, stk. 2 í somu lóg, verða innkomin mótmæli ella broytingaruppskot, sum býráðið ikki tekur við, send inn saman við uppskotinum, tá hetta verður sent landsstýrismanninum til góðkenningar.

10. juni 2025
Klaksvíkar Býráð